RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing 2012

# Innihaldsyvirlit


1. Inngangur ..... 3

2. Deildirnar ..... 4

2.1 Tórshavn ..... 4

2.2 Klaksvík ..... 4

2.3 Drelnes ..... 4

2.4 Miðvágur ..... 4

2.5 Skálavík ..... 4

2.6 Saltangará ..... 4

2.7 Hjalli ..... 4

2.8 Fyrisitingin ..... 4

3. Búskapur ..... 5

3.1 Sølugongdin gjøgnum árið ..... 5

3.2 Rakstraravlopskravið ..... 5

4. Rúsdrekkasølan – hagtøl ..... 6

4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ..... 6

4.2 Sølutøl ..... 7

5. Fløskumóttøkuskipanin ..... 8

5.1 Lógaruppskot um íløt til lidnar drekkivørur ..... 8

6. Stjóraskifti á Rúsdrekkasølu Landsins ..... 9

7. Norðurlendskt samstarv ..... 9

7.1 Norðurlendskir stjórafundir ..... 9

7.2 Borealis samstarvið ..... 9

7.3 Samstarv um samfelagsábyrgd (CSR) ..... 9

8. Ársroknskapur fyri 2012 ..... 11

Rakstrarroknskapur ..... 11

Fíggjarstøða ..... 12

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 við seinni broytingum og ásetingum í kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 við seinni broytingum.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun, sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur seks handlar kring landið: Í Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Skálavík og á Drelnesi. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur. Harumframt er ein høvuðsgoymsla í hølum á Hjalla í Hoyvík. Fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur umleið 30 fólk í føstum starvi. Harafturat eru upp til 30 tímalønt í starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2012. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2012.

Tórshavn, tann 21. august 2013

Rógvi Andrias Fossádal
stjóri

# 2. Deildirnar
Í hesum partinum verður stutt greitt frá deildunum hjá Rúsdrekkasøluni.

## 2.1 Tórshavn
Handilin í Miðlon er størsti handil okkara, og varð hesin umbygdur í 2011/2012, so hann kundi gerast meira kunda- og arbeiðsvinarligur. Leigumálið er í dag uppá 495 fermetrar, og gevur hetta betri umstøður fyri kundar og starvsfólk. Fløskumóttøkan er í øðrum leigumáli í bygninginum, har Elding heldur til.

Í handilinum eru sjey fólk í føstum starvi, svarandi til 6,2 ársverk. Harumframt eru 5-8 avloysarar.

## 2.2 Klaksvík
Handilin í Klaksvík húsast í Bøgøtu 38 og er í somu hølum, sum tá handilin lat upp í 1992. Ætlanin er at fara undir at dagføra handilshølini í Klaksvík. Leigusáttmálin skal endurskoðast, so dagføringin kann setast í verk. Arbeiðið við at dagføra deildina byrjar væntandi í 2014

Í handilinum eru trý fólk í føstum starvi, svarandi til 2 ársverk. Harumframt er ein avloysari.

## 2.3 Drelnes
Á Drelnesi eru hølini í góðum standi og støddin hóskar væl í mun til søluna. Hølini vórðu umbygd og víðkað í 2003.

Í handilinum eru trý fólk í føstum starvi, svarandi til 1,8 ársverk. Harumframt er ein avloysari.

## 2.4 Miðvágur
Handilin í Miðvági varð umbygdur og nútímansgjørdur á vári í 2011. Hesin handilin er einasta útsølustað, ið hevur eitt ølrúm, har ølið stendur kalt og rúmligt. Handilin hevur tað snið, sum fylgir nýggja handilssniðnum hjá Rúsdrekkasøluni. Ætlanin er, at allir handlarnir við tíðini skulu innrættast eftir hesum sniði.

Í handlinum eru tvey fólk í føstum starvi, svarandi til 1,5 ársverk. Harumframt eru tríggir avloysarar.

## 2.5 Skálavík
Handilin húsast á 1. hædd í sama bygningi, sum tá hann lat upp í 1992.

Í handlinum eru tvey fólk í føstum starvi, svarandi til 1 ársverk. Harumframt er ein avloysari.

## 2.6 Saltangará
Hølini í Saltangará eru í einum bygningi frá 2006. Handilin er gjørdur eftir nýggja handilssniðnum hjá Rúsdrekkasøluni. Handilin er tíðarhóskandi og lýkur øll tey krøv, sum verða sett til eina nýmótans rúsdrekkasølu.

Í handilinum eru trý fólk í føstum starvi, svarandi til 2,4 ársverk. Harumframt eru tríggir avloysarar.

## 2.7 Hjalli
Høvuðsgoymslan heldur til í leigaðum hølum uppi á Hjalla. Goymslan hevur verið í hesum hølum síðani 2001. Hølini eru rúmlig og hóska til tørvin, sum Rúsdrekkasølan hevur til eina høvuðsgoymslu.

Á høvuðsgoymsluni eru trý fólk í føstum starvi fulla tíð. Harumframt er ein avloysari.

## 2.8 Fyrisitingin
Í juni 2011 flutti fyrisitingin í nýggj høli á Skálatrøð 14. Í Fyrisitingini eru sjey fólk í føstum starvi.

# 3. Búskapur

Seinastu fimm árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni svinga millum uml. 117 og 121 mió. Kr. og í 2012 var ein lítil vøkstur í søluni í mun til 2011. Í 2012 var umsetningurin tó minni enn í 2010, men størri enn 2008, 2009 og 2011. Í mun til 2011 var talan um ein vøkstur í søluni uppá umleið 2,5 mió. kr., frá 117,7 mió. kr. í 2011 til 120,1 mió. kr. í 2012, svarandi til 2,11%.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| (1.000 kr.) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningur | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin, 2008-2012*

## 3.1 Sølugongdin gjøgnum árið

Sølan er rættuliga skiftandi gjøgnum árið. Januar og februar eru vanliga mánaðir við lítlari sølu. Um summarið er vanliga meira søla, og somuleiðis fram móti ársskiftinum.

Í 2012 var gongdin í søluni í januar, mai, juni og november betur enn væntað. Juli, september og desember høvdu betri sølu, meðan hinir mánaðarnir vóru umleið, sum væntað.

| (1.000 kr.) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 6.576 | 6.086 | 6.290 | 6.577 | 6.951 |
| Februar | 7.822 | 7.405 | 7.777 | 8.181 | 8.306 |
| Mars | 9.068 | 8.954 | 10.435 | 8.061 | 8.667 |
| Apríl | 9.301 | 9.436 | 7.560 | 9.397 | 8.484 |
| Mai | 10.814 | 9.823 | 9.958 | 10.054 | 10.131 |
| Juni | 10.949 | 10.400 | 10.536 | 9.942 | 9.599 |
| Juli | 13.844 | 14.402 | 15.957 | 15.243 | 13.360 |
| August | 9.025 | 8.543 | 8.541 | 8.173 | 8.485 |
| September | 7.955 | 9.010 | 8.480 | 7.625 | 8.065 |
| Oktober | 8.811 | 8.842 | 9.460 | 8.995 | 9.510 |
| November | 10.490 | 8.623 | 10.681 | 8.713 | 8.766 |
| Desember | 15.483 | 16.134 | 15.068 | 16.839 | 16.522 |
| Íalt | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2008-2012*

## 3.2 Rakstraravlopskravið

Í 2010 var kravið til avlop av rakstrinum hækkað við útvið 50%, frá at vera góðar 11,8 mió. kr. til at vera góðar 16,8 mió. kr. Hetta hevur ført til príshækkingar á vørunum og rationaliseringar til tess at minka um útreiðslurnar, har tað ber til – m.a. til viðlíkahald og útskifting av útbúnaði - umframt at sera neyvt eftirlit er við øllum útreiðslupostum.

Ein framgongd í umsetninginum í 2012 hjá Rúsdrekkasøluni í mun til 2011, kann vera ábending um, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum er økt. Framgongd er ikki í søluni um samanborið verður við 2010.

Tískil kann talan vera um natúrliga variatón, í søluni. Sølan kann flyta seg , so t.d. meira ella minni av øli verður selt av útsølustøðunum hjá føroysku bryggjaríunum, og at meira ella minni er selt tax-free o.s.fr.

Í 2012 vaks umsetningurin við góðum 2,5 mió. kr. í mun til árið frammanundan og eydnaðist tað at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2012.

Kravið var kr. 16.848.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til hølir. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið kr. 16.849.078, tvs. ein munur uppá 1.078 kr.

Niðanfyri er í talvu 3.3 eitt yvirlit yvir rakstraravlopini hjá Rúsdrekkasølu Landsins árini 2008-2012.

| (1.000 kr.) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Avlopskrav | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 11.848 | 11.848 |
| Avlop | 16.849 | 16.308 | 16.505 | 11.731 | 11.733 |

*Talva 3.3: Avlop frá rakstrinum, 2008-2012*

At avlopskravið varð hækkað so nógv í 2010 viðførdi, at fleiri umskipanir vórðu gjørdar, bæði viðvíkjandi prísásetingini og í raðfestingunum innanhýsis. Førleikamenningin varð avmarkað og væl minni er brúkt til íløgur og viðlíkahald, enn í tíðini undan hækkaða avlopskravinum.

Við óbroyttum inntøkum er vandi fyri at hækkaða avlopskravið fær óhepna ávirkan á tænastustøðið og trivnaðin. Neyðugt er at gera íløgur í t.d. KT og fløskumóttøkur, og at uppraðfesta førleikamenningina aftur – bæði vanligu starvsfólkamenningina og henni, sum er rættað móti vørukunnleika/-ráðgeving - umframt at tað fer at gerast alt truplari at liva upp til ásetta avlopskravið.

# 4. Rúsdrekkasølan – hagtøl

Í hesum parti verða nøkur hagtøl og vísutøl sett upp fyri søluna í 2012, og samanborðin við nøkur undanfarin ár. Viðmerkingar verða eisini gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir

| (1.000 kr.) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 54.841 | 55.117 | 56.276 | 53.814 | 53.881 |
| Klaksvík | 11.743 | 10.969 | 10.918 | 9.753 | 9.827 |
| Drelnes | 9.124 | 9.091 | 9.474 | 9.298 | 9.748 |
| Miðvágur | 6.961 | 6.693 | 6.867 | 6.069 | 6.145 |
| Skálavík | 2.367 | 2.292 | 2.333 | 2.298 | 2.206 |
| Saltangará | 14.570 | 14.390 | 14.595 | 14.449 | 14.288 |
| Ordrar o.a. | 20.534 | 19.106 | 20.282 | 22.117 | 20.748 |
| Íalt | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2008-2012*

Í Talvu 4.1 omanfyri sæst, at umsetningurin hevur verið relativt stabilur árini 2008-2011. Í 2012 var ein framgongd í umsetninginum uppá útvið 2,5 mió. kr. í mun til í 2011, svarandi til ein vøkstur uppá umleið 2,11% ímóti eini minking á 2,55% árið undan (2010-2011). Umleið helvtin av umsetninginum stavar frá deildini í Tórshavn.

| (Vísutal) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 102 | 102 | 104 | 100 | 100 |
| Klaksvík | 119 | 112 | 111 | 99 | 100 |
| Drelnes | 94 | 93 | 97 | 95 | 100 |
| Miðvágur | 113 | 109 | 112 | 99 | 100 |
| Skálavík | 107 | 104 | 106 | 104 | 100 |
| Saltangará | 102 | 101 | 102 | 101 | 100 |
| Ordrar o.a. | 99 | 92 | 98 | 107 | 100 |
| Íalt | 103 | 101 | 103 | 101 | 100 |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2008-2012*

Í talvu 4.2 eru vísutølini sett til 100 í 2008. Í 2012 eru samlaðu tølini 103. Tað er serliga stórur vøkstur í deildunum í Miðvági og Klaksvík. Men av tí at størsti umsetningurin er í deildini í Tórshavn, er tað her, tann størsti vøksturin er í upphædd, hóast vísutalið her ikki er vaksið eins nógv sum í øðrum deildum. Afturgongd er í umsetninginum í Suðuroy. Tann rættuliga stóra afturgongdin sum sást í søluni við ordrum frá 2010 til 2011, hevur í 2012 aftur stabiliserað seg soleiðis, at sølan aftur er uppi á støðinum frá 2010. Ordrar verða vanliga avgreiddir gjøgnum høvuðsgoymsluna.

## 4.2 Sølutøl

| (Litrar) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heitvín** | 9.236 | 10.067 | 10.685 | 11.129 | 11.424 |
| **Øl** | 1.036.656 | 1.033.268 | 1.101.002 | 1.103.010 | 1.155.663 |
| **Spiritus** | 247.104 | 253.844 | 267.408 | 284.124 | 293.474 |
| **Vín og cider** | 476.926 | 463.496 | 472.140 | 459.834 | 385.798 |
| **Í alt** | 1.769.926 | 1.760.676 | 1.851.235 | 1.858.097 | 1.846.359 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2008-2012*

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Næststørsti vørubólkur er vín og cider.

| (Vísutal, litrar) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heitvín** | 81 | 88 | 94 | 97 | 100 |
| **Øl** | 90 | 89 | 95 | 95 | 100 |
| **Spiritus** | 84 | 86 | 91 | 97 | 100 |
| **Vín og cider** | 124 | 120 | 122 | 119 | 100 |
| **Íalt** | 96 | 95 | 100 | 101 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2008-2012*

Talva 4.4 vísur gongdina sum indexeraði tøl. Størsta minkingin er í bólkunum spiritus & heitvín, meðan størsta framgongdin í tíðarskeiðnum 2008-2012 er í vørubólkinum vín og cider. Hetta er eisini í samsvari við, at Rúsdrekkasølan miðvíst hevur arbeitt við at fáa kundarnar at keypa veikari sløg av rúsdrekka, heldur enn spiritus.

| (Alk. litrar) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heitvín** | 1.588 | 1.713 | 1.816 | 1.889 | 1.955 |
| **Øl** | 54.925 | 52.774 | 56.057 | 55.918 | 58.555 |
| **Spiritus** | 91.329 | 94.179 | 97.982 | 104.065 | 106.600 |
| **Vín og cider** | 56.220 | 54.718 | 55.089 | 54.016 | 48.332 |
| **Íalt** | 204.061 | 203.384 | 210.893 | 215.888 | 215.441 |

*Talva 4.5: Sølan, gjørd upp í alkohol litrum, 2008-2012*

Í talvu 4.5 er sølan av nøgdini av rúsdrekka umroknað til litrar av reinum alkohol (alkohol litrar). Talvan vísur, at samlaðu alkohol litrarnir javnt falla, sum er í tráð við tálmandi politikkin, sum Rúsdrekkasølan eisini arbeiðir eftir. Útvið helmingurin av alkohol litrunum stava frá sølu av spiritus.

Í talvu 4.6 niðanfyri vísur fyrsta linja talið av fólki í Føroyum í aldrinum 15 ár og eldri tann 1. januar árini 2008-2012.

| | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **15 ár og eldri** | 37.932 | 37.957 | 37.966 | 37.969 | 37.821 |
| **Alk.l./15 ár +** | 5,38 | 5,36 | 5,55 | 5,69 | 5,70 |

*Talva 4.6: Fólkatalið, 15 ár og eldri, tann 1. Januar 2008-2012 og miðal sølan av alkohol litrum*

*Kelda: Hagstovan og egin útrokning*

Um sølan av alkohol litrum gjøgnum Rúsdrekkasøluna (sí talvu 4.5) verður sett í mun til talið av íbúgvum, sum eru 15 ár og eldri sæst, at talið av alkohol litrum hevur verið fallandi, við eini lítlari hækking frá 2011 til 2012. Í 2008 er talið 5,70 alkohol litrar, og er hetta fallið til 5,38 alkohol litrar í 2012, soleiðis sum tað framgongur av niðaru linjuni í talvu 4.6. Men hetta eru bert tølini fyri søluna av rúsdrekka gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins. Afturat hesum tølum skal leggjast tað, sum verður selt tax-free, innflutt á annan hátt ella selt gjøgnum føroysku bryggjaríini. Tað finnast ikki almenn hagtøl fyri hesa sølu.

| (Vísutal, alk.l.) | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Heitvín | 81 | 88 | 93 | 97 | 100 |
| Øl | 94 | 90 | 96 | 95 | 100 |
| Spiritus | 86 | 88 | 92 | 98 | 100 |
| Vín og cider | 116 | 113 | 114 | 112 | 100 |
| Íalt | 95 | 94 | 98 | 100 | 100 |

*Talva 4.7: Sølan í alkohol litrum, vísutøl 2008-2012*

Talva 4.7 vísur, at vísutalið fyri søluna av alkohol litrum er fallið frá vísutal 100 í 2008 til vísutal 95 í 2012. Henda minking er serliga stór í bólkinum spiritus. Alkohol litrarnir í vørubólkinum vín og cider, er einasti bólkur, har alkohol litrarnir eru fleiri, enn teir vóru í 2008.

# 5. Fløskumóttøkuskipanin

## 5.1 Lógaruppskot um íløt til lidnar drekkivørur

Í desember sendi Innlendisálaráðið "*Uppskot til løgtingslóg um íløt til lidnar drekkivørur*" til hoyringar. Uppskotið bleiv sent Rúsdrekkasølu Landsins við niðanfyri standandi samandrátti.

*"Lógaruppskot um íløt til lidnar drekkivørur er sent til hoyringar*

*Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur sent uppskot til løgtingslóg um íløt til lidnar drekkivørur út til hoyringar. Lógin skal koma ístaðin fyri núverandi lóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir frá 1994, sum seinast broytt í 2007.*

*Uppskotið, sum er sent út til hoyringar, hevur ymisk nýbrot við sær í mun til núverandi lóggávu á økinum, og sum dømi kann nevnast, at :*

*- Pant skal rindast inn á serstaka kontu við innflytan og framleiðslu*
*- Øll sølulið hava skyldu til at taka ímóti øllum íløtum*
*- Ómaksgjald kann rindast til síðsta lið í innsavningini*
*- Avmarking á 30 íløt kann ásetast, har eingin maskinmóttøka er*

*Uppskotið skal vera við til at tryggja eitt enn størri afturberingarprosent í Føroyum, og aðalmálið er, at afturberingarprosentið ikki skal vera niðan fyri 95% í 2020.*

*Uppskotið er gjørt við fyriliti fyri áhugamálum hjá vinnuni, brúkarum og umhvørvinum. Lógin skal tryggja, at tað frameftir verður lættari hjá brúkarunum á tann hátt, at tað fer at bera til at sleppa av við øll íløt á einum staði. Aðalmálið er, at færri íløt hervið enda úti í náttúruni ella í kommunalu brenniovnunum.*

*Hoyringsfreistin er sett til 21. desember 2012"*

*Lógarpppskotið sæst við at trýsta her >>.*

Rúsdrekkasøla Landsins tók ikki undir við lógaruppskotinum soleiðis sum tað var orðað, men hevði niðanfyri standandi uppskot:

**Okkara uppskot**

Skotið verður upp, at ein felags pantskipan verður stovnað, og at hendan fær loyvið at gera felags móttøkur kring landið. Hesar móttøkur skulu hava neyðugu útgerðina og førleikarnar at handfara øll íløt.

Ein høvuðsmóttøkustøð eigur at vera, t.d. á Hjalla í Havn, har øll íløtini verða samlað, skild, og avskipað til endurnýtslu ella burturbeining. Høvuðsstøðin kann samstundis verða móttøka fyri borgararnar í høvuðsstaðarøkinum. Alt skal verða á einum staði.

Skipanini kann partvíst fíggjast við:

- sølu av endurnýtslutilfari
- panti av ikki afturbornum íløtum
- einum umhvørvisavgjaldi á íløt, ið ikki kunnu endurnýtast og tí tyngja umhvørvið, umframt skiljingina á høvuðsstøðini.

Vit meta, at okkara tilmæli er betur enn tað, ið verður lagt upp til í lógaruppskotinum, tí tað er meira einfalt, effektivt og rationelt. Okkara tilmæli tekur atlit til brúkaran, innflytarar/framleiðarar, umhvørvið og tað samfelagsbúskaparliga.

# 6. Stjóraskifti á Rúsdrekkasølu Landsins

Vinnumálaráðið setti 1. desember 2012 Rógva Andrias Fossádal í starvið sum stjóra á Rúsdrekkasølu Landsins.

# 7. Norðurlendskt samstarv

Leiðslurnar í norðurlendsku rúsdrekkamonopolunum, sum saman við Rúsdrekkasøluni eru Vinmonopolet í Noregi, Alko í Finlandi, Systembolaget í Svøríki og ATVR í Íslandi, hittast nakrar ferðir um árið at umrøða mál av felags áhuga.

## 7.1 Norðurlendskir stjórafundir

Stjórafundir, har stjórarnir í norðurlendsku rúsdrekkamonopolunum hittast, eru tvær ferðir um árið. Á fundunum hevur m.a. verið umrøtt, hvussu sølan av rúsdrekka kann skipast á ein so ábyrgdarfullan hátt, sum til ber, hvussu monopolini, sum fyritøkur, skipa sítt arbeiði og umhvørvisspurningar.

## 7.2 Borealis samstarvið

Eisini er eitt norðurlendskt samstarv, sum nevnist "Borealis Partnership". Hetta hevur til endamáls at savna inn vitan um gongdina í rúsdrekkanýtsluni í EU, soleiðis at regluverkið kann styrkjast við átøkum fyri at avmarka skaðaárin frá rúsdrekkanýtsluni. Á fundum í hesum samstarvinum verður samskift um broytingar í norðurlendska rúsdrekkaregluverkinum og broytingar, sum serliga eru viðkomandi fyri norðurlendsku rúsdrekkamonopolini. Borealis samstarvið er skipað í tveimum bólkum, har tey fimm norðurlendsku alkohol-monopolini eru í tí eina, og har tað í hinum bólkinum harumframt er luttøka av øðrum norðurlendskum organisatiónum, sum arbeiða við rúsdrekka-politikki ella fólkaheilsu. Í hesum seinna bólkinum eru í verandi støðu Swedish National Institute of Public Health (SNIPH) og svenska IOGT-NTO.

## 7.3 Samstarv um samfelagsábyrgd (CSR)

Eitt annað samstarv er viðvíkjandi samfelagsábyrgdini, ella Corporate Social Responsibility (CSR) hjá rúsdrekkamonopolunum.

Slagorðið hjá Rúsdrekksøluni er "Dygd og ábyrgd". Við hesum slagorðið ynskja vit at vísa, at vit á øllum økjum taka ábyrgd, bæði hvussu vit keypa og selja okkara vørur. Rúsdrekkasøla Landsins hevur tí, í samstarvi við hinar norðurlendsku einkarsølurnar, valt at verða við í CSR-arbeiði, har londini í felag hava gjørt mannagongdir og rætninglinjur, sum tryggja, at vørurnar, sum seldar verða í okkara handlum, fara gjøgnum eitt veitingarlið, sum er samfelagsgagnligt. Hetta merkir, at framleiðarar og veitarar skulu virða mannarættindini og umhvørvið, og hava skipaði arbeiðsviðurskifti.

Ætlanin við samstarvinum er at stuðla undir og menna samfelagsliga- og umhvørvisvinarliga veiting av rúsdrekka. Við felags norðurlendskum rætningslinjum – "The Nordic Alcohol Monopolies' Code of

Conduct" – seta øll fimm monopolini somu krøv til sínar veitarar. Á hendan hátt standa vit sterkari sum ein felags norðurlensk eind. Tá krøvini til veitararnar verða tey somu í hesum fimm norðurlondum, verða krøvini lættari at fyrihalda seg til frá veitarans síðu.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur tó eins og hini monopolini í 2011 undirskrivað avtalu við allar veitarar, har teir hava góðtikið at fylgja krøvunum, sum verða sett í "The Nordic Alcohol Monopolies' Code of Conduct" – galdandi frá 1. januar 2012.

# 8. Ársroknskapur fyri 2012

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2012 settur upp í mun til árið 2011. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur.

## Rakstrarroknskapur

| | Ár 2012 | Ár 2011 |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Vørusøla | 120.140.323 | 117.658.890 |
| Vørunýtsla | -83.243.959 | -81.759.866 |
| Skiftisavlop | 36.896.364 | 35.899.024 |
| | | |
| Útreiðslur: | | |
| Starvsfólkakostnaður | 12.641.715 | 12.682.545 |
| Avskrivingar | 1.754.063 | 2.215.851 |
| Annar kostnaður | 6.798.474 | 6.080.060 |
| Útreiðslur íalt | 21.194.252 | 20.978.456 |
| | | |
| Úrslit áðrenn rentur | 15.702.112 | 14.920.569 |
| Rentur | -985 | -580 |
| Roknskaparligt avlop | 15.701.127 | 14.919.988 |

| **Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 15.701.127 | 14.919.988 |
| Avskrivingar | 1.754.063 | 2.215.851 |
| Íløgur | -606.112 | -827.690 |
| Nettoavlop | 16.849.078 | 16.308.150 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 16.848.000 | 16.848.000 |
| Munur | 1.078 | -539.850 |

## Fíggjarstøða

| | 31.12.2012 | 31.12.2011 |
|---|---|---|
| **OGN:** | | |
| Støðisogn | 2.594.502 | 3.742.453 |
| Vørugoymsla | 13.671.480 | 15.543.700 |
| Áogn postordrar | 313.252 | 157.972 |
| Onnur áogn | 55.818 | -56.441 |
| Tíðaravmarkingar | 1.058.746 | 949.263 |
| Tøkur peningur | 5.041.382 | 5.407.020 |
| Ogn tilsamans | 22.735.180 | 25.743.967 |
| | | |
| **SKULD:** | | |
| Eginogn | 2.594.502 | 3.742.453 |
| Vøru- og tænastuskuld | 5.275.853 | 330.051 |
| Onnur skuld | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 13.255.141 | 20.283.649 |
| Tíðaravmarkingar | -175.598 | -162.397 |
| Meirviriðisgjald | 1.785.282 | 1.550.211 |
| Skuld íalt | 20.140.678 | 22.001.514 |
| Eginogn og skuld tilsamans | 22.735.180 | 25.743.967 |
| | | |
| Leasingskyldur | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | 2.115.265 | 2.213.761 |